HEILSU- OG ORKUMÁLARÁÐIÐ

Fuglafjarðar Kommuna
Í Støð 5
530 Fuglafjørður

23. november 2026
Mál: 26/24257-4
Tygara skriv:
Viðgjørt: KHP

Góðkenningarskriv

Broyting í byggisamtyktini fyri Oyruna í Fuglafirði

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Fuglafjarðar kommuna við skrivi dagfestum 8. september 2026 sent Heilsu- og orkumálaráðnum uppskot til broyting í byggisamtyktini fyri Oyruna í Fuglafirði til góðkenningar.

Broytingin snýr seg um at broyta matr. nr. 632, 728, 727, 726, 718a og 725 og partar av matr. nr. 713 og 729, litra ag og 882a úr I: Frílendi til F: Almenn frítíðarøki**.**

Endamálið við broytingini er at geva møguleika fyri at skipa økið sum trivnaðarøki fyri borgarar. Kommunan vísir eisini á møguleikan fyri ymiskum átøkum í økinum og møguligari gongugøtu fram við sandinum.

Uppskotið varð kunngjørt 5. mai 2026 og lá frammi til alment eftirlit frá 7. mai til 29. mai 2026. Freistin at lata inn mótmæli og broytingaruppskot var 18. juni 2026. Eingin viðmerking ella mótmæli komu inn.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis. Nevndin viðgjørdi málið á fundi 13. oktober 2026 og tekur undir við ætlanunum hjá Fuglafjarðar kommunu.

Sagt verður frá, at Heilsu- og orkumálaráðið við heimild í § 4 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir góðkennir broytingina í byggisamtyktini fyri Oyruna í Fuglafirði, soleiðis sum Fuglafjarðar kommuna hevur søkt um.

Sambært § 7, stk. 1, í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir skal kommunan kunngera broytingina, beinanvegin hon er góðkend. Broytingin fær gildi, tá ið hon er kunngjørd.

Sambært § 7 a, stk. 2, í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir og § 3, stk. 1, í kunngerð nr. 122/2023 um lendisskrá skal kommunan senda Umhvørvisstovuni broyttu byggisamtyktina í seinasta lagi fýra vikur eftir, at hon er góðkend av Heilsu- og orkumálaráðnum.

Mint verður á, at hóast Heilsu- og orkumálaráðið nú hevur góðkent broytingina eftir reglunum í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sleppur kommunan ikki undan at fáa til vegar møguligar aðrar góðkenningar, sum krevjast frá øðrum myndugleikum. Víst verður í hesum sambandi til kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.

Hjálagt er broytta kortskjalið við átekning frá Heilsu- og orkumálaráðnum.

Hilmar Høgenni
deildarstjóri